# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO

*– Felagið virðir ikki okkara arbeiði, og nú vilja teir eisini snýta okkum fyri okkara samsýning*

*Tomislav Sivic, venjari hjá Spartak Subotica*

FM-finalurnar í badminton hjá yngru deildunum varð spælt í Badmintonhøllini í Havn um vikuskiftið. Vinnararnir í ymsu deildunum vórðu hesi:

**U11 gentur**
1 Svanna Poulsen VÍF
2 Heidi Hansen VÍF
3 Ása E.Nielen MBF

**Dreingir:**
1 Sámal Joensen ÍF
2 Janus E.Nielsen MBF
3 Aki Egilsnes VÍF

**U13 gentur**
1 Rannvá D.Carlsson HBF
2 Lilja Luid HBF
3 Randi Virgarsdóttir VÍF

**Dreingir:**
1 Leivur Joensen ÍF
2 Arnold Kristiansen ÍF
3 Magni Hansen ÍF

**U15 Gentur**
1 Guðrið Poulsen VÍF
2 Súsanna Poulsen VÍF
3 Birita Poulsen VÍF

**Dreingir**
1 Ári Ó. Ellingsgaard ÍF
2 Ári J. Ellingsgaard HBF
3 Andreas Poulsen HBF

**Kvinnuunglingar:**
1 Brynhild D. Carlsson HBF
2 Óluvá Bærentsen ÍF
3 Fióla Luid HBF

**Mansunglingar:**
1 Flóvin S.Mikkelsen HBF
2 Fríði Lamhauge HBF

**Mixdouble:**
1 Flóvin S.Mikkelsen/ Brynhild D.Carlsson HBF/HBF
2 Fríði Lamhauge/ Óluvá Bærentsen HBF/ÍF

**Double, kvinnuunglingar:**
1 Brynhild D.Carlsson/ Fióla Luid HBF/HBF
2 Sigrid G.Dalsgaard/ Óluvá Bærentsen HBF/ÍF



*Hjá gentum 13 vann Rannvá D. Carlsson kappingina framman fyri Lilju Luid og Randi Virgarsdóttir*

# Enska brakið er í kvøld

**Enn hevur Chelsea ikki somikið sum skorað móti Liverpool í Champions League. Skulu teir bláu gera dreymin hjá Abramovich til veruleika, verður hetta tó neyðugt, tá liðini í kvøld spæla á Stamford Bridge**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Rafael Benitez heldur ikki, at Jose Mourinho skal gremja seg um skaddar og troyttar spælarar við stjørnusetta hópinum, sum portugisin hevur at arbeiða við*

*Mynd: Polfoto/AP*

Eftir brakið á Old Trafford í gjár eru øll ensk eygu nú vend móti London, har talan er um reina enska hálvfinalu í Champions League. Og tað ger ikki uppgerðina minni áhugaverda og merkisvera, at talan er um mest vinnandi enska felagið, sum við siðvenju sínari skal royna at standa kurl móti russiskku milliardunum, sum Roman Abramovich hevur sprænt í felagið.

## Nervakríggj

Á pappírinum er Chelsea kanska favorittur. Og í øllum førum hava teir so nógv tann dýrara hópin av liðunum báðum. Men samstundis er tað ein veruleiki, at Chelsea enn ongan tíð hevur bast Liverpool í Champions League høpi. Hagtøl, sum ikki gerast veikari, tá lagt verður afturat, at Chelsea ikki somikið hevur skorað móti teimum reyðu frá Merseyside.

Og ikki óvæntað er Chelsea-venjarin, José Mourinho, farin at flyta fokus frá hagtølunum yvir á aðrar lutir, sum fólk so kunnu trætast um. Ikki minst hevur tað fingið ilt í Liverpool-fjepparar, at Mourinho longu nú staðfestir, at ætlanin hjá Liverpool er at fáa fleiri leikbann til Chelsea. Undan fyrru uppgerðini eru Drogba, Cole, Robben, Cech og Diarra bert eitt gult kort frá leikbanni.

## Dýr stig

Hetta eru tó lutir, sum Rafael Benitez als ikki tímir at kjakast um. Hann sigur seg heldur vilja fyrireika seg til dystin, og í hesum gevur hann ikki stórvegis gætur, at starvsfelagi í Chelsea gremur seg um skaddar og troyttar spælarar.

- Teir hava brúkt eina rúgvu av pengum seinnu árini, og teir hava kanska sterkasta hópin í landinum. Eg hoydi eisini onkran siga, at Chelsea hevur vunnið 60 stig fleiri enn vit seinastu trý árini. Men hvussu nógv man hvørt av hesum stigunum hava kostað teimum í pengum, spyr Benitez, áðrenn hann aftur vísir til góðu hagtølini.

- Vit halda okkum kunna gera tað aftur. Vit skulu skora og annars halda málið reint. Tað hava vit fyrr gjørt á Stamford Bridge, og megna vit tað aftur hesaferð, hava vit ein sera góðan møguleika undan dystinum á Anfield.

# Sivic hóttir við sakarmáli

**Tomislav Sivic hóttir við endurgjaldskravi móti FC Spartak Subotica, sum ikki hevur rindað lønina, sum venjarin átti til góðar**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tomislav Sivic, sum ætlandi skuldi venda aftur til Føroya undir hesum kappingarárinum, hevur í seinastuni virkað sum venjari hjá Spartak Subotica í Serbia.

Her hevur tó ikki gingist nakað serligt, og tá Spartak um vikuskiftið tapti 7-1 fyri Borca, var hetta samstundis seinasti dysturin hjá Tomislav Sivic við stýrisvølin.

Kanska var úrslitið í sjálvum sær nóg mikið hjá leiðsluni. Men beinleiðis orsøkin til, at Sivic ikki longur er í felagnum, er, at hvørki hann ella hjálparvenjarar hansara hava fingið løn hendan mánaðin. Hósdagurin í farnu viku varð settur sum evstamark, og tá pengarnir framvegis ikki vóru komnir, møttu hvørki Tomislav ella hinir í venjarahópinum upp mánadagin.

Hetta verður av leiðsluni tulkað soleiðis, at Tomislav sjálvur hevur sagt upp, men hesum noktar venjarin tó fyri. Hann sigur við lokalu fjølmiðlarnar, at treytirnar í sáttmálanum ikki vórðu hildnar, tí leiðslan ikki skil á fíggjarviðurskiftunum hjá felagnum.

- Felagið virðir ikki okkara arbeiði, og nú vilja teir eisini snýta okkum fyri okkara samsýning, sigur Tomislav Sivic, sum nú hóttir við at stevna FC Spartak og stjórnanum í felagnum.



*7-1 tapið fyri Borca gjørdist seinasti dysturin hjá Tomislav Sivic við stýrisvølin í Spartak Subotica. Enn resta tó nógvir pengar í, áðrenn Sivic hevur slætt borð, og saman við hjálparvenjara sínum ætlar hann tí at stevna felagnum og stjóranum*

*Mynd: Alexander Djorovic*